## Komu til Serbia í gjárkvøldið

Føroyska hondbóltslandsliðið kom í gjárkvøldið til Zajecar í Serbia, har landsdystur er á skránni mikukvøldið. Føroyski hópurin er komin fram í øllum góðum til Hotel Lux, sum er einar 10 kilometrar uttan fyri serbiska býin Zajecar – høvuðsbýin í Timocka Krajina landslutinum, har eysturi í landinum. Manslandsliðið venur tvær ferðir týsdagin og eina ferð mikudagin. Dysturin ímóti Serbia verður spældur mikukvøldið. Eftir sigrarnar á Føroyum hóskvøldið og á Serbia sunnukvøldið, er Russland fremst í EM-undanbólki 2 við 14 stigum. Serbia og Bosnia eru næst við 11 stigum, Sveis hevur 7, Italia 5 og Føroyar hava enn einki stig.

## Kostaði Tottenham 80 mió kr.



David Bentley verður eftir øllum at døma ein dýrur harri fyri enska Tottenham. Bentley varð í fjør summar keyptur til Tottenham fyri 140 mió kr., men tað hevur ongan tíð eydnast honum at bíta seg fastan á liðnum, og nú vil leiðslan í felagnum hava pengarnar aftur. Tað verður tó ikki øll upphæddin, tí ensk bløð skriva, at Tottenham er til reiðar at lata spælaran til tann, sum vil rinda 60 milliónir. Tað vil Aston Villa, og í løtuni samráðast teir við spælaran.

# Oddabrak í Gundadali

**HB hevur 100% úrtøku í sínum heimadystum – NSÍ hevur tað sama á útivølli. Í annaðkvøld verður sigursrøðin hjá øðrum teirra brotin. Og í Klaksvík skal KÍ royna at vinna á B36, sum púrasta er steðgað upp**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Lagt er upp til ordans brak í Gundadali, har HB hevur havt fulla úrtøku í heimadystum sínum. NSÍ hevur hinvegin vunnið allar útidystir sínar í ár*

Longu í annaðkvøld verður 12. umfar í Vodafone-deildini spælt.

Og talan verður um nøkur ordans brak í bæði toppi og botni.

Í Gundadali er lagt upp til rættan toppdyst, tá NSÍ kemur á vitjan. Runavíkingar hava elt HB stóran part av árinum. Ikki minst takkað verið framúr úrslitunum á útivølli, har runavíkingar hava vunnið fimm av fimm dystum.

Og HB hevur júst somu hagtøl á heimavølli, og tí vilja teir uttan iva royna at styrkja sær enn meira um støðuna á stigatalvuni, har teir eru trý stig undan NSÍ og Víkingi áðrenn dystirnar í morgin.

Víkingur spælir á útivølli móti 07 Vestur. Fyrr í ár vann Víkingur greiðan sigur móti vágamonnum í Sarpugerði, og uttan iva fara teir ljósabláu eftir eini endurtøku, soleiðis at teir halda trýstinum á HB og NSÍ.

Seinasti dysturin millum lið úr ovaru hálvu verður á Toftum, har tað eisini líkist einum braki, tá B68 tekur ímóti EB/Streymi.

Toftamenn, sum ikki hava tapt í sjey dystum, hava alla orsøk at vera nøgdir um síni avrik seinastu longu tíðina, og nú er liðið veruliga farið at amast móti teimum, sum stríðast um heiðursmerki. Her hevði EB/Streymur avgjørt ætlað sær at vera eitt av liðunum, men enn hevur ikki borið ordiliga til hjá meistarunum, sum við tapinum móti HB meira líkjast einum miðjuliði enn einum seriøsum FM-avbjóðara.

### Tvey botnbrak

Teir báðir seinastu dystirnir síggja eisini sera spennandi út á pappírinum, hóast teir ikki snúgva seg um heiðursmerki.

Í Fuglafirði tekur ÍF móti AB í einum dysti, sum fuglfirðingar sera illa hava ráð til ikki at vinna. AB varð undan árinum ikki mett millum tey sterkastu, men gongdin hevur verið so heilt hampuliga góð higartil í ár. Og kunnu Argjamenn eisini fáa nakað við sær úr Fuglafirði, eru teir helst somiki ovarliga staddir, at teir als ikki nærkast nøkrum niðurflytingarvanda yvirhøvur.

Tað gera fuglfirðingar hinvegin, og hjá teimum ræður um at vinna sær stig – og tað skjótt eisin.

Og so er seinasti dysturin í Klaksvík, har KÍ kanska stendur við víðhigar til besta møguleikanum fyri trimum stigum. Eftir fínu byrjanina er B36 púrasta steðgað upp, og liðið hevur ikki vunnið, síðani teir í triðja umfari høvdu heimavøll móti júst KÍ.

## vodafone deildin

**Vodafone-deildin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 11 | 8 | - | 2 | - | 1 | 29 | 16 | 13 | 26 |
| 2 NSÍ | 11 | 7 | - | 2 | - | 2 | 26 | 15 | 11 | 23 |
| 3 Víkingur | 11 | 7 | - | 2 | - | 2 | 26 | 15 | 11 | 23 |
| 4 B68 | 11 | 5 | - | 3 | - | 3 | 21 | 18 | 3 | 18 |
| 5 EB/S | 11 | 4 | - | 4 | - | 3 | 20 | 15 | 5 | 16 |
| 6 AB | 11 | 4 | - | 2 | - | 5 | 12 | 16 | -4 | 14 |
| 7 B36 | 11 | 3 | - | 3 | - | 5 | 14 | 20 | -6 | 12 |
| 8 ÍF | 11 | 2 | - | 3 | - | 6 | 11 | 18 | -7 | 9 |
| 9 07 Vestur | 11 | 1 | - | 3 | - | 7 | 20 | 34 | -14 | 6 |
| 10 KÍ | 11 | 0 | - | 4 | - | 7 | 8 | 20 | -12 | 4 |

**Formbarometrið**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 6 | 5 | - | 1 | - | 0 | 20 | 10 | 10 | 16 |
| 2 Víkingur | 6 | 5 | - | 1 | - | 0 | 15 | 7 | 8 | 16 |
| 3 B68 | 6 | 4 | - | 2 | - | 0 | 15 | 7 | 8 | 14 |
| 4 NSÍ | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 13 | 7 | 6 | 12 |
| 5 EB/S | 6 | 1 | - | 4 | - | 1 | 10 | 9 | 1 | 7 |
| 6 AB | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 5 | 10 | -5 | 7 |
| 7 ÍF | 6 | 0 | - | 3 | - | 3 | 6 | 10 | -4 | 3 |
| 8 B36 | 6 | 0 | - | 2 | - | 4 | 4 | 11 | -7 | 2 |
| 9 07 Vestur | 6 | 0 | - | 2 | - | 4 | 10 | 18 | -8 | 2 |
| 10 KÍ | 6 | 0 | - | 2 | - | 4 | 5 | 14 | -9 | 2 |

**1. deild**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 13 | 8 | - | 3 | - | 2 | 30 | 14 | 16 | 27 |
| 2 B71 | 13 | 8 | - | 2 | - | 3 | 30 | 17 | 13 | 26 |
| 3 TB | 12 | 6 | - | 4 | - | 2 | 21 | 17 | 4 | 22 |
| 4 VB/S | 12 | 6 | - | 3 | - | 3 | 25 | 20 | 5 | 21 |
| 5 B68 | 13 | 6 | - | 2 | - | 5 | 29 | 21 | 8 | 20 |
| 6 NSÍ | 13 | 6 | - | 2 | - | 5 | 24 | 26 | -2 | 20 |
| 7 FC Hoyvík | 13 | 6 | - | 1 | - | 6 | 16 | 20 | -4 | 19 |
| 8 Víkingur | 13 | 3 | - | 5 | - | 5 | 14 | 15 | -1 | 14 |
| 9 Skála | 13 | 2 | - | 2 | - | 9 | 13 | 25 | -12 | 8 |
| 10 MB | 13 | 0 | - | 2 | - | 11 | 13 | 40 | -27 | 2 |

### Komandi dysir

**Vodafone-deildin**

17.06 HB-NSÍ — Petur Reinert
17.06 ÍF-AB — Georg N. Rasmussen
17.06 KÍ-B36 — Dagfinn Olsen
17.06 07 Vestur-Víkingur — Andrew Christiansen
17.06 B68-EB/S — Eiler Rasmussen

**1. deild**

16.06 VB/S-TB — Lars Müller

## FAKTA um Vodafone-deildina

**Av misgávum vóru fakta fyri 11. umfar í Vodafone-deildini ikki við í blaðnum í gjár. Vit biðja lesararnar halda okkum tilgóðar og prenta upplýsingarnar niðanfyri.**

**Víkingur-KÍ 4-1 (1-1)**
**0-1**: Atli Gregersen, 6.
**1-1**: Kristoffur Jakobsen, 38.
**2-1**: Zoltan Bukzsegi, 51.
**3-1**: Súni Olsen, 66.
**4-1**: Sverri Jacobsen, 80.
**Dómari**: Lars Müller
**Hjálpardómarar**: Dan Højgaard & Edvard Højgaard
**Víkingur**: Geza Turi – Sverri Jacobsen, Atli Gregersen, Niclas Niclasen, Hanus Jacobsen – Símun Louis Jacobsen (Magnus Skoralíð, 52.), Súni Olsen (Hjartvard Hansen, 75.), Sølvi Vatnhamar, Hans Jørgin Djurhuus (Bárður Hansen, 84.) – Zoltan Bukzsegi – Andreas Lava Olsen
**Gult kort**: Niclas Niclasen
**KÍ**: Jákup Mikkelsen – Steffan Kalsø, Jógvan Isaksen, Sørmund Kalsø, Rudolf Eliasen – Ivan Joensen (Niels Pauli Danielsen, 76.), Oddmar á Lakjuni (Jón Jacobsen, 71.), Erland B. Danielsen, Eli Simonsen (John Hammer, 68.), Leon Bjartalíð – Kristoffur Jakobsen
**Gult kort**: Leon Bjartalíð og John Hammer

**AB – B68 0-3 (0-1)**
**0-1**: Pól Jóhannus Justinussen, 4.
**0-2**: Dánjal Pauli Højgaard, 50.
**0-3**: Ahmed Keita, 78.
**Dómari**: Ransin N. Djurhuus
**AB**: Tórður Thomsen – Janus Joensen, Tehe Aristide, Rói Danielsen, Alex Mellemgaard – Evrard Blé, Jobin Drangastein, Kenneth Jacobsen – Høgni Joensen (Rasmus Nielsen, 67.), Nikolaj Eriksen (Tummas Hans Rubeksen, 56.), Tummas Justinussen (Dánjal Rói Olsen, 56.)
**Gult kort**: Kenneth Jacobsen, Tehe Aristide, Evrard Blé
**B68**: Vlada Filipovic – Poul N. Poulsen (Jónleif Højgaard, 64.), Pól Jóhannus Justinussen, Johan Dávur Højgaard, Niklas Joensen – Óli Olsen (André Olsen, 83.), Nenad Stankovic, Ndende Adama Gueye, Øssur Hansen (Jóan Símun Edmundsson, 46.) - Dánjal Pauli Højgaard, Ahmed Keita
**Gult kort**: Vlada Filipovic

**B36-ÍF 0-0**
**Dómari**: Petur Reinert
**B36**: Jóan Pauli Jakobsen – Johan Ellingsgaard, Poul Arni Jacobsen, Herberg í Lon Jacobsen, Bergur Midjord – Róaldur Jacobsen, Klæmint Matras, Magnus Olsen – Brima Koroma, Høgni Eysturoy (Hanus Thorleifsson, 57.), Bogi Hermansen (Christian í Garði, 82.)
**Gult kort**: Brima Koroma
**ÍF**: Andras Gango – Áki Petersen, Bartal Eliasen, Pól Ennigarð, Jan Ellingsgaard (Viggo Johannesen, 83.)– Frank Poulsen, Aleksander Jovevic, Høgni Zachariassen – Hanus Eliasen (Vincent Jacobsen, 55.), Nenad Saric (Ari Ellingsgaard, 46.), Andy Olsen
**Gult kort**: Áki Petersen

**NSÍ-07 Vestur 5-1 (2-0)**
**Dómari**: Georg Rasmussen
**1-0**: Bogi Løkin 20.
**2-0**: Karoly Potemkin 43.
**3-0**: Bogi Løkin 47.
**4-0**: Bogi Løkin 58.
**4-1**: Jens Erik Rasmussen 65.
**5-1**: Óli Hansen br. 82.
Meinhard Joensen – Jens Joensen, Óli Hansen, Jóhan Troest Davidsen (Monrad Holm Jacobsen, 78.), Einar Hansen – Jan Martin Mortensen, Høgni Madsen, Bogi Løkin, Jan Ingi Petersen (Sjúrður Jacobsen, 76.), Hjalgrím Elttør (Øssur Dalbúð, 76.) – Karoly Potemkin
**Gult kort**: einki
Trygvi Askham - Sjúrður Ellefsen, Gunnar Haraldsen, Hans Arni Ellefsen, Hendrik Rubeksen – Ricardo Da Silva Braga, Ragnar Niclasen, Milan Pejcic, Sigtór Petersen (Eli F. Nieslen, 30.) – Tór-Ingar Akselsen, Jens Erik Rasmussen
**Gult kort**: Hendrik Rubeksen

**EB/Streymur – HB 2-3 (1-2)**
**0-1**: Bjarni Jørgensen, 8.
**1-1**: Alex Dos Santos, 27.
**1-2**: Bjarni Jørgensen, 31.
**2-2**: Arnbjørn Hansen, 53.
**2-3**: Andrew á Fløtum, 54.
**Dómari**: Dagfinn Olsen
**EB/Streymur**: Gunnar á Steig – Bárður Olsen, Egil á Bø (Dánjal Davidsen, 70.), Marni Djurhuus, Alex Dos Santos – Arnbjørn Hansen, Pauli G. Hansen (Pætur D. Jacobsen, 70.), Sorin Angel, Levi Hanssen, Hans Pauli Samuelsen – Leif Niclasen (Gudmundur Nielsen, 61.)
**Gult kort**: Marni Djurhuus
**HB**: Símun Rógvi Hansen – Pætur Jørgensen, Hans á Lag, Rasmus Nolsøe, Mortan úr Hørg – Bjarni Jørgensen (Christian R. Mouritsen, 82.), Kári Nielsen, Fróði Benjaminsen, Rógvi Poulsen (Jóhan Ejvind R. Mouritsen, 90.) – Páll M. Joensen (Milan Kulic, 68.) – Andrew á Fløtum
**Gult kort**: Pætur Jørgensen